# Heini O. Heinesen hevur brotið avtalu



*Løgmaður heldur lítið um framferðarháttin hjá Heina O. Heinesen. – Slík mál skulu ornast innanhýsis og ikki í fjølmiðlunum*

**Anfinn Kallsberg, løgmaður, hevur ongar viðmerkingar til sjálvar skuldsetingarnar frá Heina O. Heinesen til Bjarna Djurholm, men samgonguleiðarin vísir á, at slíkar ósemjur skulu loysast innanhýsis og ikki í fjølmiðlunum. - Um Heini O. Heinesen er ónøgdur, hevur hann havt ríkiligt av tíð at venda sær til Vinnumálaráðið ella mín, áðrenn hann fer til fjølmiðlarnar**

SAMGONGUSTRÍÐ
*Heini í Skorini*

Í gjár vendi formaðurin í tingbólkinum hjá Tjóðveldisflokkinum, Heini O. Heinesen, sær til Sosialin við grovum skuldsetingum og atfinningum mótvegis Bjarna Djurholm, Vinnumálaráðharra. Kunoyingurin er ónøgdur við, at arbeiðið við Norðoya-tunlinum ikki er komið nakran veg, og leggur hann Bjarna Djurholm undir at royna at seinka og oyðileggja verkætlanina.

Løgmaður ynskti hósdagin ikki at gera nakra viðmerking til sjálva ósemjuna millum Heina og Bjarna, tí hann ikki ikki visti um nakað stríð, men hann vísti tó á, at Heini O. Heinesen í øllum førum hevur borið seg skeivt at.

## Brotið avtalu

Løgmaður vísir á, at slíkar ósemjur ikki skulu loysast í fjølmiðlunum men innanhýsis.

- Vit hava ferð eftir ferð avtala at loysa slíkar ósemjur í einrúmi og ikki í fjølmiðlunum, og tískil hevur Heini O. Heinesen borið seg skeivt at. Hann hevur havt ríkiligt av tíð at venda sær til bæði Vinnumálastýrið og løgmann, og tískil hevur hann brotið avtaluna, vit hava gjørt, sigur Anfinn Kallsberg.

## Eingin vilji til innanhýsis samarbeiði

Løgmaður vísir á, at orsøkin til fleiri av ósemjunum í samgonguni hava verið, at eingin vilji hevur verið til innanhýsis samarbeiði.

- Júst hesin framferð-arháttur er orsøkin til fleiri av ósemjunum í samgonguni seinastu tíðina, tí tað tykist ikki vera nakar vilji at samarbeiða innanhýsis. Í staðin verður farið til fjølmiðlarnar, og tað loysir so ongan trupulleika, sigur ein avgjørdur løgmaður. Hann heldur tað vera einki minni enn vánaligt, at ein samgongufelagi ikki vendir sær til viðkomandi persónar, áðrenn hann fer í fjølmiðlarnar við tí, hann hevur uppá hjarta. Sum samgonguleiðari vísir Anfinn Kallsberg á, at hetta bert tykist vera eitt gleps innan ólavsøkuna.

Spurdur, hvørjar viðmerkingar hann hevur til sjálvar ákærurnar frá Heina O. Heinesen til Bjarna Djurholm, hevur løgmaður ongar viðmerkingar.

- Eg veit einki um hetta, og kann tí ikki úttala meg. Men hetta er ikki ein rættur háttur at samskifta uppá, slær løgmaður fast.

## Móti at hótta samgonguna?

Ein kann spyrja seg sjálvan, um tað er ein nýggjur móti millum løgtingsmenn at hótta samgonguna orsakað av onkrum máli. Ferð eftir ferð hava løgtingsmenn verið frammi við hóttanum um samgonguslit, og spurningurin er, um man kann liva við slíkum hóttanum, sum tá avtornar ikki tykjast vera annað enn kávalótir og orð.

Hesaferð er talan sostatt um Heina O. Heinesen, sum er ónøgdur við framferðarhátt Bjarna Djurholms, og so verður at síggja, um Heini O. Heinesen ger álvara av hóttanum sínum, so tær fáa avleiðingar fyri samgonguna.








# Landsstýrismaður undir trýsti

**Avgerðin um umstrídda fiskiloyvi hjá línuskipinum Jógvani S fellur ikki fyrr enn eftir ólavsøku, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum. Hann hevur í grundini einki val, um hann vil halda fram, tí Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt honum greitt, at fiskiloyvi skal takast aftur, um flokkurin framvegis skal stuðla honum**



*Jacob Vestergaard tekur avgerð um fiskiloyvi hjá línuskipinum Jógvan S eftir ólavsøku, men longu frammanundan hevur Høgni Hoydal gjørt sína støðu greiða. Verður tað ikki tikið aftur, fær tað avleiðingar.*

*Mynd: Jens K. Vang*

JÓGVAN S
*Ingi Rasmussen*

Skal samgonguni vera lív lagað eftir ólavsøku, hevur Jacob Vestergaard í grundini einki val. Hann noyðist at taka fiskiloyvi til línuskipið Jógvan S aftur.

Á landsstýrisfundi mikudagin gjørdi Tjóðveldisflokkurin bart. Sambært upplýsingum hjá Sosialinum boðaði formaður flokksins Høgni Hoydal frá, at Tjóðveldisflokkurin stendur fult og heilt aftan fyri tað, sum framsøgumaðurin í fiskivinnumálum hjá flokkinum, Tórbjørn Jacobsen, hevur ført fram í Sosialinum.

Tað vil siga, at um fiskimálaráðharrin ikki tekur fiskiloyvið aftur, sum sambært landsstýrismálanevndini varð givið línuskipinum Jógvani S í heimildarloysi, so noyðist Tjóðveldisflokkurin at taka undir við einum misáliti á Jacob Vestergaard.

Hetta líkist málinum við Jørgen Niclasen nágreiniliga. Tað er prinsippið fram um politikkin. Landsstýrismálanevndin er einmælt komin til ta niðurstøðu, at viðgerðin í Fiskimálaráðnum, tá Jógvan S fekk fiskiloyvi, var ólóglig og atlitini, sum lógu til grund fyri avgerðini, vóru ósaklig. Verður niðurstøðan ikki fylgd, er eftirlitsnevndin hjá løgtinginum avhøvdað, og tað kann løgtingið ikki góðtaka.

## Fær avleiðingar

Høgni Hoydal váttar í dag fyri Sosialinum, at landsstýrismaðurin og samgongan hava fingið støðuna hjá flokkinum at vita.

– Støðan hjá okkum er júst hon, sum framsøgufólkini hjá flokkinum (Tórbjørn Jacobsen, blðm.) hava ført fram. Tað hava vit boðað Jacob Vestergaard frá, sigur Høgni Hoydal.

Vil tað siga, at tað einasta, sum tit kunnu góðtaka í hesum málinum, er at fiskiloyvið verður tikið aftur?

– Tað er tað, sum framsøgufólkini hava úttalað seg um, so tað er eingin ivi um, sigur Høgni Hoydal.

Hvat nú, um avgerðin verður ein onnur?

– So sigur tað seg sjálvt, at tað fær avleiðingar. Tað er eingin ivi um tað. Tað er fyri at varðveita álitið á skipanina og landsstýrismálanevndina. Og tað er eisini fyri at fáa ruddað upp í fiskivinnulóggávuni og –umsitingini, so hesi ivamálini ikki alla tíð stinga seg upp, sigur Høgni Hoydal.

Hava tit soleiðis givið Jacob Vestergaard knívin á barkan?

– Nei, tað haldi eg ikki, at tú kanst siga. Vit hava ikki viljað buldrað stórvegis alment. Vit hava sagt Jacob Vestergaard okkara støðu og vit hava álit á, at tað verður eingin trupulleiki av hesum, sigur Høgni Hoydal, sum leggur dent á, at hetta ikki snýr seg um lívið hjá samgonguni.

## Avgerðin tikin

Jacob Vestergaard sigur seg langt síðan vera komnan til eina niðurstøðu í málinum, men hann bíðar við at almannakunngera sína støðu.

– Eg vildi fyrst viðgera ta avgerð, sum eg ætli at taka, politiskt við mín flokk, men tað hevur ikki eydnast, og tí fari eg bíða til eftir ólavsøku at siga, hvør niðurstøðan er, sigur Jacob Vestergaard.

Hann viðgongur, at málið var uppi at venda á landsstýrisfundinum mikudagin, men hann kennir tað ikki, sum Tjóðveldisflokkurin hevur lagt trýst á hann.

– Eg havi ikki følt meg undir nøkrum sum helst trýsti, og eg taki mína avgerð út frá míni bestu sannføring. Hetta er eitt kompliserað mál, sum eg vil tosa við flokkin um, og tí dregur tað út. Hóttanir og annað kann eg ikki brúka til nakað sum helst. Eg kenni málið, og eg havi fingið avleiðingarnar at vita frá mínum embætisfólkum, og tað havi eg at halda meg til, sigur Jacob Vestergaard.

## Illgruni um mutur

Sosialurin skilir, at Jacob Vestergaard hellir mest til at taka fiskiloyvið aftur og taka tær avleiðingar, sum kunnu standast av tí, men tað vil hann hvørki vátta ella avsanna. Trupulleikin skal vera, at aðrir í flokkinum vilja halda fast við avgerðina at geva loyvi.

Hvussu er og ikki. Róð hevur verið framundir, at tað var ein rein politisk avgerð at geva Jógvani S fiskiloyvi. Umsóknin varð avgreidd eftir rekordtíð, og loyvið varð givið einum partamanni í Fólkaflokkinum dagin áðrenn løgtingsvalið.

– Eg eri so ikki partur av nøkrum rossahandli, og tað kjakið ætli at mær als ikki inn í. Eg var ikki landsstýrismaður, tá tilsøgn varð givin til fiskiloyvið, og eg kenni einki til nakran handil. Eg havi embætismenn at halda meg til, og tað vóru teir, sum avgreiddu málið. Eg haldi meg eina og aleina til fakta í málinum, sigur Jacob Vestergaard.

## Reiðarin hóttir við endurgjaldi

**Jógvan Lützen, reiðari, umhugsar at reisa endurgjaldskrav ímóti landsstýrinum, um fiskiloyvið, sum hann fekk til Jógvan S dagin áðrenn valið, verður tikið aftur**

FISKILOYVI
*Ingi Rasmussen*

Eftir ólavsøku tekur Jacob Vestergaard landsstýrismaður við fiskivinnumálum støðu til, um fiskiloyvi til línuskipið Jógvan S verður tikið aftur.

Reiðarin á Jógvani S heldur tað vera ein »utopiskan tanka«, at fiskiloyvið verður tikið aftur. Og hendir tað kortini, kann talan gerast um eitt stórt endurgjaldskrav, segði hann við Útvarp Føroya hósdagin.

– Skuldi tað hent seg, at farið verður eftir loyvinum, so mugu vit viðgera spurningin um endurgjald. Og tá skal hædd takast fyri fiskiloyvinum, vit hava fingið tillutað í tíggju ár, og hvørjar inntøkurnar kundu verið av tí. Hædd skal takst fyri útreiðslunum, vit hava havt av at gera Jógvan S kláran til fiskiskap, og tað er ikki einki, sigur Jógvan Lútsen, sum ikki vil seta tal á enn.

Skøran og Barið vóru eisini lagdir, so Jógvan S kundi fara til fiskiskap, og tað skal eisini havast í huga, tá eitt møguligt endurgjaldskrav skal gerast upp, sigur reiðarin við Útvarpið.

Kostirnir hjá landsstýrismanninum eru sostatt tvinnir og lítið mjúkir. Letur hann standa til, rýkur hann helst sjálvur. Tekur hann loyvið aftur, so fær hann endurgjaldskrav.